# Eingin grund er til panikk, hóast euro-kursurin fellir

GJALDOYRA
*Rolf Guttesen*



Føroyska vinnulívið følir eisini at amerikanski dollarin skiftir virði í mun til euro, tí krónan er bundin at euro. Mánadagin noteraði Europeiski CentralBankin ECB, at nú fekst 1,31 dollar fyri euro. Seinast í farna ári gav ein euro nakað meir, ella 1,36 dollars.

Á TV-støðini CNBC hevur amerikanski fíggjarmálaráðharrin John Snow boðað frá, at stjórnin har vesturi roynir at minka um hallið á gjaldsjavnvágini, fyri á tann hátt at styrkja dollaran.Fríggjadagin í seinastu viku var annars ivi um hvønn vegin dollarin mundi fara at ganga, sum eisini sæst á strikumyndini. Dollarin "ivaðist" eina løtu, tí beint tá hevði amerikanska hagstovan kunngjørt tøl nýggj tøl. Hesi vístu, at tað ikki vóru komin so nógv arbeiðspláss aftrat í USA, sum væntað ella vónað var. Teir høvdu væntað eini 175.000 arbeiðspláss aftrat, men har komu næstan 20.000 færri. Skuldi tað takast sum at vøksturin í búskapinum var um at steðga upp? Ja, so lítið kann fáa ávirkan á valutakursin.

## USA-rentan er avgerandi

Uppá nakað longri sikt er tað kanska heldur rentan í USA, sum ávirkar gongdina í dollar-kursinum. Hesum viðvíkjandi sigur danska vinnulívsblaðið Børsen 7. januar, at tann bólkurin hjá Amerikanska CentralBankanum, sum kallast FOMC, stúrir fyri, at inflatiónin í landinum er ein hóttan móti búskaparligum vøkstri. Tá FOMC sigur so, vænta spekulantar beinanvegin, at ein rentuhækkan er konandi í næstum, sum skal mótvirka inflatión..

Og hægri renta í USA ger tað meiri lokkandi at eiga dollars, og tí fer kursurin á dollars í løtuni skjótt uppeftir. Soleiðis sum vit hava valt av avmynda gongdina í myndini, so bendir hetta kurvuna niðureftir. So fyribils er profetið, um at dollarin mundi fara at krasja, sum umrøtt var í hesum teigi í seinastu viku, útsett fyribils.




## Fyrimunir við sterkari dollar

Ein sterkari dollar skuldi givið euro- og krónulondum fyrimunir at útflyta til USA, og kanska harvið eitt trýst á spidaran, so búskaparligi vøksturin í Europa kundi fingið størri ferð. Tað kann ikki skaða føroyska búskapin, sjálvt um hesin gongur eftir serligum reglum ella ongum reglum kanska. "Small is dangerous", sum ein høvundur skrivaði einaferð, og kanska er tað nakað í hesum eisini, sjálvt um tað ikki ljóðar gott.

## Aðrar metingar av gongdini

Dagblaðið Politiken úr København hevur eina analysu av støðuni, har J.F. Kirkegaard, sum arbeiðir í Washington DC á Institute for International Economics. Han sigur, at hallið á amerikanska gjaldsjavnanum krevur at USA hvønn gerðandisdag skal draga 2,5 mia. dollars av útlendskum kapitali til sín fyri at fíggja hetta hall. Soleiðis kann USA drena ein stóran part, 60-65 %, av tí kapitali sum annars kundi farið til íløgur áðrastaðni, um dollarin skal halda sítt virði. Men seinastu 3 árini er hann so eisini fallin við umleið 35%. Hetta falið kann sigast at fíggja ein part av nevnda halli á gjaldsjavnanum. Sambært Kirkegaard kann dollarin komandi 2-3 árini falla enn meir, so dollarin fæst fyri 4 til 4,50 danskar krónur (í dag kostar hann 5,68 kr). So, kanska er tann seinasta styrking av dollara bert ein ein lítil afturundirgerð, áðrenn fallið heldur fram. Vit fáa at síggja.

---

**Framhald av síðu 19**

*tú at tað er neyðugt at samansjóða oynna á øðrum økjum eisini?*

– Eg haldi ikki at tað er heppið við teirri spjaðing, sum er. Hinvegin haldi eg at ein samansjóðað Suðuroy hevði staðið nógv sterkari úteftir og tað hava vit brúk fyri.

– Eru vit í tveimum, tosa vit ikki við einari rødd og tað er eitt afturstig fyri Suðuroynna. Í syðru helvt tosað tey útfrá tí, sum tænir Vági best og í norðarðu helvt verður tosað útfrá tí,sum tænir Tvøroyri best og tað er ein stórur vansi.

Søren Lünell Bruhn vísir til, hvussu sterk summi øki norðanfyri eru afturímóti Suðuroynni. Eitt nú heldur hann, at Norðoyggjar áttu at verið ein fyrimynd hjá suðuroyingum og eittdømi um, hvussu nógv meiri fæst á skafti, tá ið øll lyfta í felag heldur enn tá ið vit draga hvør sína línu.

*Skuldi øll Suðuroyggin verið ein kommuna?*

– Eg eri ikki politikari og eg veit, at hetta er eitt kensluborið evni. Men eg haldi, at vit eiga at seta okkum sum mál at gera alla oynna til eina kommunu, tí eg eri sannførdur um, at tað hevði verið ein fyrimunur.

Stjórin í Suðuroyar Sparikassa tekur fult undir við uppskotinum um, at fyrsta stigið átti at verið, at allar kommunurnar í oynni seta ein bólk av serfrøðingum at lýsa fyrimunir og vansar við samanlegging á einum fakligum grundarlagi.

– Samstundis kundu hesir serfrøðingar stungið út í kortið, hvussu ein Suðuroy við einari kommunu kundi verið skipað og, hvørjir hentleikar kunnu verða hvar og hvørjar tænastur kunnu vera hvar.

– Tað er eitt arbeiðið, sum kommunurnar kundu fíggja í felag, tí verður eitt slíkt arbeiðið gjørt, vita allir suðuroyingar, hvat vit tosa um, tá ið vit tosa um samanlegging og so hava vit nakað ítøkiligt at viðgera málið víðari útfrá

Sjálvir ivast hann ikki í, at úrslitið av eini slíkari kanning hevði verið talað fyri, at øll oyggin skal vera ein kommuna.

Sum dømi nevnir hann ætlanina er at leggja fleiri málsøki undir kommunurnar at umsita, eitt nú barnaforsorg.

– Eitt einasta barn við atferðartrupulleikum kann kosta upp ímóti einari millión um árið. Tekur bara ein slíkur tilburður seg upp í eini lítlari kommunu, kann hon enda í fíggjarligum ófóri, tí hon hevur ongan møguleika at klára eina slíka útreiðslu.

– Hetta er eitt dømi um, hvussu neyðugt tað er at samansjóða oynna. Við eini samansjóðaðari oyggj, hevði tað heldur ikki verið neyðugt at havt allar hentleikar í øllum kommununum, tí so hevði tað ligið nógv betri fyri at fingið fulla nyttu av teimum útbyggingum, sum eru í teimum ymsu bygdunum.

*Hvat heldur tú so um hitt stóra kjakevnið í Suðuroynni og tað er ætlanin at flyta miðnámsskúlan til Hovs og at byggja røktarheim í Vági ístaðin?*

– Er ætlanin at gera ein rættiligan skúladepil í Hovi við fleiri útbúgvingum, kann hon skilja tankan, tí tað kundi drigið útbúna arbeiðsmegi til oynna. Men er talan bara um at flyta ein miðnámsskúla til Hovs, dugi eg ikki at síggja, at tað er nakar fyrimunur. Skal tað verða nakar fyrimunur, skal miðdepilin hava eina ávísa støðd við nógvum útbúgvingum.

– Og tað skal helst ikki verða so, at tað verður ein spøkilsisbýlingur, sum liggur steindeyður klokkan trý hvønn dag.

–Tá ið Hovstunnilin er gjørdur, er Suðuroyggin altso ikki serliga stór, so frástøðan ímillum tær ymsu bygdirnar kann ikki vera ein trupulleiki. Fyri tað kunnu ymsir hentleikar verða ymsastaðni í oynni.

Søren Lünell Bruhn heldur enntá, at øll fótbóltsfeløgini í oynni áttu at sligið seg saman í eitt Oyggjarfelag, so at vit høvdu eitt lið í 1. deild og hetta liðið skuldi havt sum sítt greiða mál at verið ímillum tey trý bestu liðini í Føroyum.

– Yvirhøvur eina vit at gera, tað, vit kunnu fyri at samansjóða alla oynna í eina eind á øllum økjum.

– Eg veit at hetta er eitt kensluborið evni í Suðuroy, men tað er neyðugt, at vit hugsa sum suðuroyingar og ikki sum tvørafólk ella vágbingar.

– Suðuroyingar skulu ikki kappast sínamillum. Teir skulu standa saman og venda kappingini ímóti miðstaðarøkinum, sigur Søren Lünell Bruhn.